# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**KAVAKETUR TIL SØLU**
185/14" so gott sum onki brúktar, biliga til sølu.
*Tlf. 213058*

**TIL SØLU**
Mitsubishi Pajero 2.5 TD árg. 88, nýsýnaður, í góðum standi, 20.000,- kr.
*Tlf. 267584*

**PÍKADEKK TIL LASTBIL**
6 píkadekk til lastbil Good Year stødd 285/70 R19,5 til sølu fyri 8.500,-
*Tlf. 213577*

**TOYOTA COROLLA XLi**
árg. 91, sýnaður í juni 2003, í góðum standi, til sølu fyri 11.000 kr.
*Tlf. 310208/260535*

**NISSAN KING CAB**
4 x 4 v/ last, árg. 11/88, 100.000 km, sýnaður okt. 03, til sølu.
*Tlf. 213577*

**PÍKADEKK TIL SØLU**
4 píkadekk á felgum 195/65 R15 til sølu.
*Tlf. 224479*

**NÝSÝNAÐUR**
Toyota Corolla 1.3 frá 94, koyrt 117.000 km. Gott Pioneer anlegg við, til sølu fyri 38.000 kr.
*Tlf. 229375*

**TIL SØLU**
Toyota HiAce 2,4 diesel 4WD/ 1991 til sølu.
*Tlf. 447794 el. 254272*

**TIL SØLU**
Svartur Volvo 760 Turbo diesel, árg. 83, nýsýnaður, nýlakeraður. Nýggj píkadekk fylgja við og er í góðum standi.
*Tlf. 443280/213280*

**DATSUN 280 ZX**
2+2 Targa, beigelittur, hevur koyrt 93.000 km, er frá 82 og í sera góðum standi. Bilurin er frá Sveitz, er 100% orginalur. Nærri fæst at vita á
*tlf. 0045 98451620 ella 0045 51298478 e. kl. 17*

**SKODA OCTAVIA**
Ambiente 1.6i svartur, árg. 30-05-02 km 5600, sentrallás, klimaanlegg og fartpilot, til sølu fyri 150.000 kr. ella hægstbjóðandi. Nývirðið á bilinum er 195.000 kr. Ring á
*tlf. 361514 ella 561514*

**VAUXHALL CAVALIER**
LI 1998CC 5 hurðar, frá 1992, enskt skrásettur til sølu til hægstbjóðandi.
*Tlf. 522522/322522*

**TOYOTA CAMRY**
St. car árg. 87 til sølu fyri 2.000,-
*Tlf. 215477*

**HEILÁRSDEKK TIL SØLU**
4 heilársdekk á felgum stødd 195/50/15.
*Tlf. 258052*

**GOOD YEAR DEKK**
við píkum, stødd 185/75 R16 bíliga til sølu.
*Tlf. 441293 eftir kl. 18*

**YNSKIST**
Gearkassi til Mazda 121, árg. 95 ynskist til keyps.
*Tlf. 256177*

**PÍKADEKK**
Fýra góð píkadekk á felgum, brúkt ein vetur, 185/65/15 radial. Nýprísur 5.100 kr. selist fyri 3.000 kr.
*Tlf. 229235*

**BMW 320i**
árg. 87 til sølu.
*Tlf. 313692*

**VW GOLF DIESEL**
árg. 86 til sølu sum eykalutir, góðan motor.
*Tlf. 267584*

**MAZDA 323**
1.8i, árg. 96, í góðum standi.
*Tlf. 267584*

**VEGNA FLYTING**
er ein Skoda Fabia árg. 2001, koyrt 31.000 km bíliga til sølu.
*Tlf. 217368*

**ÚTSTOYT YNSKIST**
Útstoyt til Aprilia SR5 ynskist til keyps.
*Tlf. 316401*

**CITROEN BX 1.6i**
árg. okt. 92, seinast sýnaður 12.02. til sølu fyri 10.000 kr.
*Tlf. 222177*

**PÍKADEKK**
á felgum 2 ára gomul. Stødd 175/65/R14 hava 4 hol. Kunna brúkast til VW Polo Classic
*Tlf. 214142*

**MAZDA 323**
1.3 árg. 1987 til sølu. Sýnaður 3/2003. Prísuppskot 7000,- kr.
*Tel. 228030*

**YNSKIST TIL KEYPS**
4 felgur til Toyota Corolla 1995 modell og píkadekk til sama.
*Tlf. 310209/210209*

**DAIHATSU CHARMANT**
bíliga til sølu, koyrir væl, hevur plátur.
*Tlf. 322227/216166*

**VW JETTA**
árg. 88, gráur, til sølu fyri 8.000,- kr. Bilurin er í góðum standi.
*Tlf. 211838*

**VW PASSAT**
árg. 1986 til sølu sum eykalutir, kann koyra.
*Tlf. 441434/775556*

**PÍKADEKK**
Fýra góð píkadekk á felgum, 4 hol, 185/65/14, 2.000 kr.
*Tlf. 371659*

**PÍKADEKK**
4 góð píkadekk 175 x 70 x 14 1500 kr.
*Tlf. 371659*

**PÍKADEKK**
2 píkadekk á felgum 175/65 14" + tvær felgur. Passa til Nissan Almera til sølu.
*Tlf. 421057/264574*

**CITROEN SAXO**
til sølu. Bilurin er diesel, árgang 2000 Nýsýnaður sær gott út.
*214842*

**DAIHATSU CHARADE**
til sølu sum eykalutir. Motorur o.a. í góðum standi, rímiliga góð heilársdekk undir, fýra eykafelgur við summardekkum fylgja við. Prísur 3.000,-
*Tlf. 211488*

**TIL SØLU**
Deilir til Citroen ZX, ymiskir deilir, so sum plátudeilir, motorur og gearkassi 1.4i o.a., bert koyrt 65.000 km.
*Tlf. 218980 – 215656*

**HEILÁRSDEKK**
4 felgur við 2 góðum og 2 ikki so góðum heilársdekkum 165 80 13. felgurnar eita 4 x 100 til sølu fyri 1500 kr.
*Tlf. 226376*

**SPORTFELGUR TIL SØLU**
4 mánaðar gamlar 17" sportfelgur við 5 holum á summardekkum til sølu fyri kr. 7.000 (sum nýggjar).
*Tlf. 222353 ella 316780*

**TIL SØLU**
Nýsýnaður Ford Sierra 2.0 i, árg. 1994, 143.500 km, DOHC 2.0 i motor, aut. gear, alu-felgur, sóltak el-rútar framman. Sony CD-spælari. 4 stk. píkadekk á felgum fylgja við. Prísuppskot 55.000 kr. Er at síggja í Bóndabrekku.
*Tlf. 219673*

**TIL SØLU**
Nissan Patrol 33TD, árg. 88, uttan plátur, eyka gearkassa, motori, felgum og dekk. Honda Accord 2.0 EXI uttan plátur, bíliga til sølu.
*Tlf. 211732*

**TOYOTA LANDCRUISER**
Árg. 86, sýnaður 30.09.2003. Hann hevur 4 spildurnýggj dekk undir og koyrir sera væl. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 226880*

**TOYOTA CARINA 1.6**
Árg. 87, bíliga til sølu. Hevur plátur, koyrir væl, krevur ábøtur.
*Tlf. 361364 ella 210364*

**8 FELGUR**
til Daihatsu 1300, 13-55.
*Tlf. 455132*

**EIN TOYTA COROLLA, DIESEL**
til sølu sum eykalutir. Kann koyra.
*Tlf. 455132*

**HONDA CIVIC 1.5 ILS**
Árg. 97, km. 112.000. 17'' felgur, tónaðar rútar, senkaður, cd-spælara o.a.
*Tlf. 229632*

**TIL SØLU**
Ein Ford Mondeo, árg. 95, til sølu sum eykalutir til hægstbjóðandi. Er dømdur vrak.
*Tlf. 281757*

**YNSKIST TIL KEYPS**
Til ein Toyota Carina II, árg. 89, ynskist høgra hurð framman, vinstra forskerm og frontpláta.
*Tlf. 218873 ella 448868*

**FELGUR TIL SØLU**
Fýra felgur til Citroen Xantia býliga til sølu.
*Tlf. 322269*

**PÍKADEKK**
4 lítið brúkt píkadekk 185/70 x 14 til sølu. Ring og gev eitt boð!
*Tlf. 223266*

**NISSAN SUNNY COUPÉ**
árg' 85, í hampiligum standi, koyrir væl. Lítið rustaður, nýggj dekk, útstoyt og ymsar aðrar deilir til sølu fyri 6.000 kr.
*Tlf. 214487*

**PÍKADEKK**
155 SR 13 til sølu fyri einans 500,-
*Tlf. 312915 millum kl. 18-19*

**FORD SIERRA 2.3 DIESEL**
árg. 88, bíliga til sølu, onga nr. plátu, eykalutir fylgja við.
*Tlf. 361180*

**HONDA ACCORD 1.8i**
km 95.000 nýsýnaður árg. 03/99. Sera vælhildin, ikki roykt í bilinum, kompl. spoylarasett o.a. TSS luftfiltur og 15" og 17" sportfelgur, verður seldur um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 451006/221056*

**REYÐUR NISSAN SUNNY 1.6**
árg. 89, koyrt uml. 194.000 km til sølu fyri 13.000,- Nýggj kamreim, kobling og kølari. Koyrir væl.
*Ring 252736, Edna*

**PÍKADEKK TIL SØLU**
4 píkadekk á felgum stødd 185/65 R15 + 4 skálir. Hoyrir til Toyota Avensis. Alt fyri 2.600,-
*Tlf. 456260/229634*

**BMW 525 DIESEL**
aut. gear, koyrt 250.000 km, 6 syl. motor selist sum vrak.
*Tlf. 444737/507650*

**TIL SØLU**
Mazda 626, árg. 86, koyrir væl, bert koyrt 100.000 km, manglar ábøtur, til sølu fyri 5.000 kr.
*Tlf. 422139 ella 222342*

## Amboð

**STIGI TIL SØLU**
Mrk. Wibe, úr aluminium, 8 m. langur, sera lættur, 1 ára gamal, til sølu. Nýprísur kr. 2.600,- Gev eitt boð.
*Tlf. 213058*

**ELEKTRISK HÆFTE- OG**
sømpistol, 20 skud pr. minut, magasin til 120 hæfter, søm og klemmer. 3.000 ekstra klemmer og søm medfølger kr. 650,-
*Tlf. 250338*

**GOMUL BINDIMASKINA**
ynskist til keyps. Skal vera í góðum standi.
*Tlf. 262763*

**TIL SØLU**
Brøyt X21 II, í góðum standi til sølu.
*Tlf. 223502*

**VERÐUR SELT UNDIR HÁLVAN PRÍS**
1 lagervognur úr stáli, 50 cafeteriatallerkar v/ 3 rúmum, 50 bláir serveringsbakkar, 2 ruskstativ.
*Tlf. 424145 ella 213145*

**VERÐUR SELT UNDIR HÁLVAN PRÍS**
2 ára gamalt kassatól v/terminali íkobla 4 ára gamalt kassatól.
*Tlf. 424145 ella 212345*

**SNIKKARABONKUR**
miðal stødd, prísur einans 750,-
*Tlf. 312915 millum kl. 18-19*

**PLENUKLIPPARI**
Ginge, prísur einans 175,-
*Tlf. 312915 millum kl. 18-19*

## Arbeiði

**UM TIT VILJA**
hava nakað málað innandura nú til jóla, kunnu tit ringja á
*tlf. 508817*

**VASKING Í HAVN**
Nærløgd og álítandi 34 ára gomul kvinna bjóðar seg fram at vaska fyri fyritøkur ella privat allar vikudagar, eisini aftan á vanliga arbeiðstíð. Eg eri altíð at hitta á tlf. 270027 ella 320515.
*Tlf. 270027/320515*

**REINGERINGSHJÁLP**
søkist 2 tímar hósdag seinnapart.
*Tlf. 316865/225665/217782*

**HJÁLP TIL JÓLA?**
Tørvar tær hjálp til jóla t.d. til reingerð/høvuðsreingerð ella at mála okkurt rúm? Eg eri álítandi, arbeiðssom tilkomin kvinna, ið kann veita jólahjálp eftir arbeiðstíð og vikuskiftinum. Helst í vestur-/miðbýnum.
*Tlf. 316219*

**VASKIARBEIÐI**
Tilkomin kvinna søkist til reingerð 2 tímar um vikuna eftir tørvi.
*Tlf. 313520 aftaná kl. 18*

**REINT TIL JÓLA**
Suðuroyingar! Hevði tað ikki verið eitt hugskot at fingið alt tipp-topp til jóla. Vit átaka okkum alla reingerð í Suðuroy, bæði hjá privatum, á virkjum og stovnum og eisini umborð á skipum. Tilboð vera givin. Skrivi til Sosialurin, Bos 76, 110 Tórshavn
*Bill. mrk. 1313-c*

**ALT INNANDURA MÁLARAARBEIÐI**
verður gjørt sera bíliga. Ring og fá eitt gott tilboð.
*Tlf. 252506*

**VASKIARBEIÐI**
19 ára gomul genta átekur sær vaskiarbeiði allar vikudagar.
*Tlf. 269446*

**HYGG HER!**
Eg eri ein 14 ára gomul genta, sum søkir arbeiði í Havn, alt hevur áhuga. Vinarliga ring
*tlf. 509185*

## Barnaansing

**ER TAÐ NAKAR**
ið hevur brúk fyri barnagentu? Eg eri ein 18 ára gomul genta, ið gjarna vil ansa barni/børnum tínum.
*Tlf. 520895*

**GENTA/KONA**
søkist at ansa 2 ára gamlari gentu gerandisdagar frá kl. 8.00-16.00. Helst har onnur børn eru eisini.
*Ring 218802/222428/317802*

## Barnaútgerð

**BARNABILSTÓLAR**
2 Chicco barnabilstólar bíliga til sølu.
*Tlf. 316798/214334*

**BARNAVOGNUR TIL SØLU**
Ein svartur barnavognur av merkinum TRILLE til sølu. Hevur lufthjól, lift, tasku og flugunet. Sær út sum nýggjur.
*Tlf: 372465/222427*

**TRILLE BARNAVOGNUR**
við madrassu, dýnu + kodda, lift, puslitasku, regnslag og kurv undir. Nýprísur 5.500 nú 3.500
*Tlf. 310215*

**RIMASONG**
5 mðr. gomul rimasong við seingjarrond, himmal og seingjartoy til sølu fyri 1500,-
*Tlf. 310215*

**FERÐASONG**
Ferðasong til sølu fyri 275,-
*Tlf. 310215*

**GRULVIGARÐUR YNSKIST**
Lítil grulvigarður ynskist bíliga til keyps.
*Tlf. 457830 - 259268*

**TIL SØLU**
Bilbarnastólar MaxiCosi mino 0-10 kg. Siege multi 0-18 kg. Britax super 10-25 kg. Borðstólur at hanga, ein barnareiggja úr plast.
*Tlf. 314797/514797*

**BARNABILSTÓLUR**
Britax bilstólur upp til 13 kg. til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 456454/226383 eftir kl. 17*

**TIL SØLU**
Brúktur barnavognur bláur, 400 kr.
*Tlf. 421810/261585*

**YMIST TIL SØLU**
Snugliposi (Babybjørn) myrkablá, kr. 300,- Babylift, myrkablá, kr. 200,- Lift til combivogn (Brio), kr. 400,-
*Ring 317525 ella 258216*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
*(set X)* undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12$^{00}$, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.***

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……..
Bygd/býur:……..
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
**Sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki



## Bátaútgerð

**UM HÓSKANDI**
boð fæst, verður útróðrarbáturin M/B Brimnes seldur. Báturin hevur einki fiskiloyvi.
*Tlf. 441560/224226*

**5-MANNAFAR**
(glastrevja) til sølu við leysamotori. Báturin er í Vági.
*Tlf. 217335*

**PRESENDING**
Seymað presending til 7-8 mannafar (23' við húsi á miðjuni) ynskist.
*Tlf. 314919/225803*

**TIL SØLU**
Ein 8-10 HK Saab bátamotorur, árg. 90, við kobling umstýring, aksilgreiðum og tanga.
*Tlf. 218999*

**VOLVO PENTA MOTORUR MD17**
36 HK v/geari, er nýsýnaður, eykalutir fylgja við, til sølu vegna keyp av størri motori.
*Tlf. 211543*

**BÁTAPLÁSS YNSKIST**
til leigu í Vestmanna til móti sumri 2004.
*Tlf. 421343 ella 504201*

## Bingo

**BINGO**
verður í Felagslonini í Fuglafirði, leygardagin 15. november kl. 16.00. Á lutaseðli 2 ísl. krov.
*Eldrafelagið Borgin*

**VÁGS PENSIONISTAFELAG**
hevur gott bingo í Framtíðini onskvøldið 26. nov. kl. 19. Á lutaseðli ræst kjøt, skerpikjøt, før. kjøt, karamellur o.m.a.
*Nevndin*

**PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN**
hevur bingo í Losjuni mikukvøldið 19. nov. kl. 18.
*Nevndin*

**GOTT BINGO**
verður í Bygdarhúsinum á Strondum, leygardagin 15.11. kl. 16.00. Burturlutað verða gávukort, matur o.a.
*9a í Stranda skúla*

**TVØROYRAR KLUBBI**
Gott bingo verður í Tvøroyrar klubba tórskvøldið 20. nov. kl. 19.
*Nevndin*

**TVØROYRAR KLUBBI**
Gott bingo verður í Tvøroyrar Klubba leygarkvøldið 15. nov. kl. 20, minna eykaspælið endar.
*Nevndin*

**GOTT JÓLABINGO**
verður onskvøldið tann 26. nov. kl. 19 á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi. Øll eru vælkomin.
*Veitslunevndin*

**GOTT BINGO**
verður í Róðrarneystinum á Argjum 13. nov. kl. 19.00. Full pláta 400 kr., tó 6. og 12. spæl 600 kr. Á lutaseðli m.a. karamellur, hjólbøra fylt við mati, 2 gávukort á 500 kr. og før. krov. Drigið verður ímillum spølini, eykaspæl, koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Argja Róðrarfelag*

**GOTT JÓLABINGO**
verður í Glæmuni í Kvívík týskvøldið 25. november kl. 19. 6. og 12. spæl gávukort á 500 kr. Nógvir góðir vinningar so sum dunnur, karamellur og nógv annað gott. 12 plátur fyri 100 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli balja full av mati. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Glæman*

**KAGGIN**
Gott bingo verður fríggjakvøldið 14.11. kl. 20. Vinningar: gávukort o.a. 15 vinningar á lutaseðli m.a. 10 før. krov. Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl.
*Kaggin*

## Bøkur

**LADEMANNS**
Leksikon frá 1-22 til sølu fyri 300,- kr.
*Tlf. 311267*

# Bústaðarveiðan

**Fyri nakrar av kundum okkara sóknast vit eftir sethúsum og grundøkjum, sum lúka niðan fyri nevndu ynskjum. Um tygum halda, at hetta svarar til og tygara, sum ætlanin er at selja, so set tygum í samband við okkum – møguliga hava vit rætta keyparan.**
**Vit átaka okkum at selja fasta ogn um alt landið.**

**Nr. 935**
**Stað:** Tórshavn, Berjabrekka
**Slag av veiðu:** Íbúð
**Stødd:** Alt hevur áhuga
**Kostnaður:** Mesti kostnaður 800.000,- kr.

**Nr. 936**
**Stað:** Eysturoy/Vágar
**Slag av veiðu:** Sethús
**Stødd:** Alt hevur áhuga
**Ynski:** Gjarna við útsýni
**Kostnaður:** Uml. kr. 350.000,-

**Nr. 937**
**Stað:** Tórshavn
**Slag av veiðu:** Grundøki
**Stødd:** Min 600 m²
**Ynskir:** Við útsýni
**Kostnaður:** Uml. 700.000,- kr.

**Nr. 938**
**Stað:** Tvøroyri
**Slag av veiðu:** Grundøki
**Stødd:** 700-1000 m²
**Ynskir:** Við góðum útsýni
**Kostnaður:** 60.000,- kr.

**Nr. 939**
**Stað:** Tvøroyri/Trongisvágur
**Slag av veiðu:** Sethús
**Stødd:** Fam. við 3 børnum
**Ynski:** Við útsýni
**Kostnaður:** Uml. 800.000,- kr.

**Nr. 940**
**Stað:** Tórshavn
**Slag av veiðu:** Sethús
**Stødd:** Min. 55 m²
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 1.000.000,-

**Nr. 941**
**Stað:** Tórshavn
**Slag av veiðu:** Grundøki
**Stødd:** Min. 350 m²
**Kostnaður:** Uml. 300.000,- kr.

**Nr. 942**
**Stað:** Alt hevur áhuga
**Slag av veiðu:** Grundøki/jørð
**Stødd:** Minst 10.000 m²
**Kostnaður:** Helst hús á økinum og nakað uttangarðsjørð

**Nr. 943**
**Stað:** Tórshavn – Argir
**Slag av veiðu:** Sethús
**Stødd:** Uml. 120 m² – 140 m²
**Ynskir:** 3 kømur og kjallara
**Kostnaður:** Mesti kostnaður kr. 1.400.000,-

# Húsamekling

**Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,**
**Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo**
**www.husamekling.fo**
**Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16**
***Keyp og søla av fastari ogn***

## Burturm. /funnið

**BILLYKIL MISTUR**
Er tað nakar, ið hevur funnið ein billykil í miðbýnum í Havn í vikuskiftinum. Lykilin er til ein Suzuki bil.
*Tlf. 256853*

**BLÁ HARRASÚKKLA**
Hvør eigur eina bláa harrasúkklu, ið hevur staðið uttan fyri hjá okkum í longri tíð.
*Tlf. 351122*

**KONTOINN-TASKA**
Svørt, kontoinn-taska, við skúlabókum í, horvin á torginum í sms hósdagin 6/11. Vinarliga um tú hevur sað ella veit um hana so ring.
*506040 ella319637*

## Býli

**HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST**
Mamma við einum barni ynskir hús ella íbúð til leigu í Vestmanna skjótast gjørligt.
*Tlf. 584392*

**HÚS TIL LEIGU**
Hús í Vági til leigu.
*Tlf. 217335*

**1-VERILSISÍBÚÐ TIL LEIGU**
Íbúð á Oyrasundskollegiinum til leigu í styttri tíðarskeið frá 1. des. Íbúðin er møblerað. Skal tú niður at ferðast, ella manglar tak yvir høvdið, so ring ella meyla á:
*32887032 ella nitram1999@hotmail.com*

**ÍBÚÐ YNSKIST TIL LEIGU**
Einlig kvinna ynskir lítla íbúð í Havn.
*Ring 509289*

**LÍTIL ÍBÚÐ**
til 2 lesandi ynskist skjótast í Eysturoynni. Fara væl um.
*Tlf. 264304, Jóhannes/256116, Helga*

**KAMAR TIL LEIGU**
Kamar niðarliga á Hoydalsvegnum við atgongd til køk, bað, felagsrúm og vaskirúm til leigu til friðarligt, edrúligt fólk.
*Tlf. 509253 eftir kl. 14.30*

**ÍBÚÐ ELLA HÚS YNSKIST**
Vit eru eitt par við 2 børnum, sum ynskja íbúð ella hús við minst 3 kømurum í Tórshavn, Hoyvík, Argjum ella í Kollafirði skjótast gjørligt.
*Tlf. 503079*

**KAMAR TIL LEIGU**
á Norðasta Horni, 2.300 kr.
*Tlf. 266575*

**HÚS ELLA ÍBÚÐ**
søkist til leigu í Klaksvík skjótast møguligt. Vinarliga ring
*457396*

**TIL KBH. Á JÓLUM ELLA Í JANUAR**
1. vær. kollegie-íbúð á Oyrasundi til framleigu frá 20.dec. til 1.feb. Kann eisini framleigast í styttri tíðarskeið.
*Tlf. (+45) 61710670, Anna*

**HÚS Í VESTMANNA**
Húsini á matr. 121 á Deild í Vestmanna eru til sølu. Kunnu siggjast niðast á www.birgir.krea.fo ella ring
*Tlf. 564040*

**ÍBÚÐ Í KBH**
Møblerað 2-rúmsíbúð við altan, centralt á Vesturbrúgv til leigu vikuskifti ella longri. Nærri fæst at vita á
*Tlf. 261560*

**ÍBÚÐ Í KBH YNSKIST**
Par við einum barni søkir íbúð í KBH-umráðnum. Leiga, keyps ella andel - alt hevur áhuga.
*Tlf. 0045 32887015 ella 0045 22521750 eftir kl. 16*

**KAMAR TIL LEIGU**
Hevur tú hug at leiga saman við 3 ungum gentum, so hava vit eitt gott kamar miðskeiðis í Havnini. Felagsrúm eru: stórur køkur, hjallur, 2 stovur, baðverisli v/vaskimaskinu + eyka wc, gangur og durur. Skrivi til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
*Bill. mrk. 1709-a*

**STÓRT KAMAR**
í vesturbýnum til leigu við atgongd til køk, bað og vaskimaskinu.
*Tlf. 221158*

**GRUNDØKI YNSKIST**
Grundøki ynskist til keyps í Streymoynni – vit hugsa okkum 15-30 min. koyring til Havnar, annars hevur alt áhuga.
*Tlf. 321897*

**NEYÐARRÓP**
Eini hjún søkja íbúð í Havn skjótast gjørligt. Roykja og drekka ikki. Gjalda til tíðina, kunnu gjalda 1 mðr. depositum. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 1704/1*

## Dansur

**FORELDRABÓLKURIN »KOM OG DANSA FYRI UNG«**
skipar fyri dansiskeiði 13-18 ár í Losjuni í Havn. Dansilærarar eru frá »Komið og Dansið« úr Íslandi. Undirvist verður í Rock'n Roll, Salsa, Linedance, o.ø. 22.-23. nov.
*Ringið á 511707, 210780 og 215570*

**KLAKSVÍKAR DANSIFELAG**
Hugnakvøld verður í Skálanum 15. nov. kl. 20. Tekning hjá einum av nevndarlimunum áðrenn 14. nov.
*Nevndin*

**ALL THAT RAIN Í HVALBA**
Leygarkvøldið 27. desember, spælir All That Rain í Roynhøllini í Hvalba.
*Royn*

## Dýr

**FITTUR SVARTUR KETTLINGUR BLIVIN VEKK**
í Stoffalág mánadagin. Hevur hvít/-gráa reim um hálsin við violettari kúlu.
*Tlf. 317737*

**UNDULÁTUR TIL SØLU**
Undulátur til sølu fyri kr. 500. Búr við tilhoyri fylgir við.
*Ringið 443216*

**KANINUNGAR TIL SØLU**
Kaninungar til sølu fyri 50 kr. stk. til djóravinir.
*Tlf. 441761*

**ER TAÐ NAKAR**
í Saltangará ið saknar eina kritahvíta kanin?
*Tlf. 447001*

**KANINUNGAR**
fáast við at ringja til
*tlf. 313738/213736*

**HUNDAHVØLPUR**
Sera fittur brúnur hundahvølpur – tík – 10 vikur, fæst við at avheinta hana. Bert til djóravin.
*Tlf. 254036*

**BÚR TIL DVØRGAHAMSTRARA**
Búr til dvørgahamstrara ynskist. Eigur nakar eitt búr til dvørghamstrarar at selja mær. Kriatúr kunnu møguliga fylgja við í keypinum.
*Tel. 320133 (eftir kl 17.00)*

**UTTANDURA KANINBÚR**
Uttandura kaninbúr 230 x 110 x 90 cm við føstum húsi og skýli og einum leysum húsi bíliga til sølu.
*Tlf. 314103*

**AKVARIULJÓS**
Akvariuljós pumpa til fiskaboblu, hitalikam, iltpumpa o.a. til akvariir bíliga til sølu.
*Tlf. 314103*

**KANINBÚR TIL SØLU**
Innandura kaninbúr 60 x 40 x 35 cm bíliga til sølu.
*Tlf. 314103*

**HEY DJÓRAVINIR**
Tveir fittir svartir 9 vikur gamlir kettlingar verða latnir djóravini.
*Tlf. 321203*

**HUNDAHVØLPUR – TÍK**
Er tað nakar djóravinur, sum vil hava meg, eg eri brún og svørt og ógvuliga fitt, um so er kanst tú fáa meg í viku 50.
*Tlf. 455647*

**HUNDAHVØLPUR**
Sera fittur ljósabrúnur og hvítur hundahvølpur (7 vikur) verður latin djóravini.
*Ringið 321702 um kvøldið*

**HYGG HER!**
Hvør vil hjálpa mammu mínari við at geva mær eitt gott heim. Eg eri ein border collie tík, eg eri svørt og hvít og sera fitt.
*Tlf. 424277*

**HEY HEY**
Vit eru 2 fittir kaninungar, sum fylla 6 vikur 1/2 nov. Vit eru sera mjúkir og gleða okkum til tú ringir eftir okkum
*á 262515 eftir kl.16.00, Rannvá*

**MARSVÍN**
Brúnt/hvítt, 2 mðr. gamalt, 80 kr.
*Tlf. 266575, Norðasta Horn*

**KETTLINGAR**
Tríggir fittir kettlingar fáast við at heinta teir. Duga at eta, leppa og pissa í sand. Ert tú góð við kettu, so ring. Bert til djóravin.
*Tlf. 456894/250242*

**HUNDAHVØLPAR**
4 fittir hundahvølpar, kunnu fáast, við at ringja
*tlf. 532379 ella 333404*

**TIL SØLU**
2 vøkur gásapør undan góðum slag, hava 12-13 ungar um ári. Eitt gjeldærakrov fæst eisini.
*Tlf. 252897*

**HEY HEY**
Vit eru 3 sera vakrir og fittir kettlingar (kettur) og okkum tørvar eitt gott heim og ein góðan vin. Vit kunnu fara heimanífrá um 6 vikur.
*Tlf. 314757/258868*

**UNDULÁTUR TIL SØLU**
Undulátur til sølu, búr við tilhoyri fylgir við, til sølu fyri 500 kr.
*Ringið 441925*

**KANINUNGAR YNSKJAST**
Er tað nakar, sum hevur tveir dvørgakaninungar til sølu/lata. Helst eina hon og ein hann. Eri djóravinur. Vinarliga ring á
*tlf. 315910/267728, Laura*

## Húsarhaldstól

**ATLAS FRYSTISKÁP**
til sølu fyri 1.000,- hædd 105 cm. br. 55 cm. dj. 60 cm.
*Tlf. 322885*

**ZANUSSI KØLI/FRYSTISKÁP**
til sølu fyri 3.500 kr. 9 mðr. gamalt.
*Tlf. 508660/458033*

**TIL SØLU**
Gram køliskáp h: 100 b: 55 til sølu.
*Tlf. 311416/262550*

**KØLI/FRYSTISKÁP**
Zanussi køli/frystiskáp, modell ZD22/6, 55 cm breitt, 168 cm høgt, kr. 2000,- til sølu frá 28/11-03.
*Ring 317525 ella 258216*

## Innbúgv

**SONG TIL SØLU**
Træsong úr furu, 93 x 208 cm. við so gott sum nýggjari madrassu, mrk. Comfort, tjúgd 18 cm, og botni til sølu. Nýprísur uml. kr. 3.500,- Gev eitt boð.
*Tlf. 213058*

**SPÍSIBORÐ TIL SØLU**
ovalt oljuviðgjørt furuborð við útskornum beinum 160 cm + 2 plátur á 40 cm - óslitið - til sølu fyri kr. 1.500,- (nýprísur 4.000)
*Tlf. 444630*

**KLÆÐNASKÁP TIL SØLU**
Klædnaskáp, TM Line Profil, hvítt, 1. floks, H:230 B:238 D:60, 4 skjóti-hurðar, harav 2 jalousi og 2 við spegl, 8 hillar, 2 tráðkurvar og 6 skuffur. Yvirskáp við hill báðumegin og 4 jalousi skjótihurðum. Sera væl viðfari. Til sølu fyri 4.800 kr. Kann sígjgjast á www.vesenberg.fo/skap.htm
*Tlf. 322432*

**KØKSBORÐ**
v/ eykaplátu 158 x 88 selist fyri 300,- kr. Træsong við góðari madrassu 95 x 200 selist fyri 800 kr.
*Tlf. 311267*

**YNSKIST**
Ein telefonbonkur v/ skuffum. Ein koyggjusong. Skrivstovustólar á hjólum.
*Tlf. 314797/514797*

**TIL SØLU**
Sofasett 1+1+3 (brúkt) 500,-
*Tlf. 421810/261585*

**SOFA YNSKIST**
Hevur nakar eina sofu, sum kann sláast út til sovisofu at selja mær fyri umleið 500 kr. Alt hevur áhuga.
*tlf. 265862 ella 211962*

**BORÐ TIL FØROYAR**
Er tað nakar, ið kann taka eitt borð (140 x 80) fyri meg til Føroyar fyri 200 kr.
*Tlf. 322169/215306, Beinta*

**LEÐURSOFUR TIL SØLU**
Ein 3 pers. og ein 2 pers. leðursofur, svartar, til sølu fyri 3.000 kr.
*Tlf. 310347*

**REOLSYSTEM**
2 sektiónir reolsystem bíliga til sølu, brúnt. Hittist eftir kl. 17 á
*tlf. 317524*

**KOMMODA**
Lítil fitt kommoda í gomlum stíli, útskorið avsýrað eikitræ, stødd: h 60 x b 70 x d 42 cm til sølu fyri 400 kr. Ur, antikt, at heingja upp, úr avsýrðum útskornum træi, við penduli, til sølu fyri 400 kr. Kondisúkkla, eldri stílur, til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 447990*